Suðuroyingar fáa útvarp um 14 dagar

Suðurrás fer í fyrstu syftu atsenda eina tíma um vikuna, tá ið vetrarskráin hjá Útvarpinum byrjar

LOKALVARP
Áki Bertholdsen

Um einar 14 dagar fáa suðuroyingar sítt egna útvarp - um enn tað verður við ógvuligari avmarkaðari senditíð.

Útvarpsrásin Suðurrás, sum varð stovnað fyrr í summar, fer nevniliga at senda seinni í hesum mánaðinum.

Suðurrás verður við í útvarpsskránni hjá Útvarpi Føroya og fyribils fer lokalvarpið hjá suðuroyingum at senda ein tíma um vikuna.

Arbeiðið verður skipað soleiðis, at manningin á Suðurrás fer at gera sendingarnar, sum Útvarp Føroya síðani keypir og sendir.

Á kunnandi fundi um Suðurrás í Stóra Pakkhúsi í Vági týskvøldið, greiddu stigtakararnir til lokalvarpið frá ætlanum sínum.

Á fundinum greiddi formaðurin í nevndini fyri Suðurrás, Bjarni Johansen frá, at fyribils er ætlanin, at Suðurrás skal enda frá klokkan 17 til 18 hvønn týsdag í vetrarskránni hjá Útvarpi Føroya. Men hann minti samstundis á, at tað er ikki endaliga avgjørt, so tíðin og dagurin kann verða broytt, tá ið vetrarskráin er endaliga løgd.

Bjarni Johansen segði, at Suðurrás fer bara at senda tilfar úr Suðuroynni. Talan kann verða um samrøður við suðuroyingar, frágreiðingar um hendingar og tilburðir í oynni og annað.

Hann legði samstundis dent á, at at Suðurvarp er ikki eitt lokalvarp fyri Vág, ella fyri syðru helvt, men tað er fyri alla oynna. Tey fara sostatt at leggja doyðin á at senda tilfar úr allari oynni, heilt úr Sumba til Sandvíkar.

Senda allan dagin

Umframt tilfar til hendan eina tíma um vikuna, halda menninir aftanfyri Suðurrás, at tað er ikki óhugsandi at Suðurrás eisini fer at hava okkurt íkast til onkra morgunsending av og á, og hendir okkurt heilt avgerðandi í Suðuroy, kunnu eisini onkur tíðindi til Útvarpið koma upp á tal.

Teir duldu tó heldur ikki fyri, at ætlanin var at keypa teirra egna sendara so skjótt, sum tað læt seg gera. Endamálið er nevniliga at gera eitt veruligt lokalvarp fyri Suðuroynna, sum fer at senda ein part av samdøgurinum, eins og Rás 2 ger.

Nær tað er komið so langt, er ilt at siga, tí tað kostar ikki heilt frítt. Men fyribils máttu teir samstundis staðfesta, at suðuroyingar høvdu verið dyggir at stuðla Suðrrás, eitt nú hava allar kommunurnar í oynni, stuðla tiltakinum fíggjarliga – men enn er onki svar komið frá Porkeris- og Hvalbiar Kommunu, tey vóna tó eisini at frætta haðani.

Nevndarformaðurin í Suðurrás, Bjarni Johansen, ytst høgrumegin, greiðir Arnfinni Thomasen, vm, og Palla Jacobsen frá ætlanini um Suðurrás. Tað skiltst, at teir báðir eru eisini sinnaðir at taka eina hond í, gjørdust tað neyðugt

Tað vóru heilt fá fólk møtt á kunnandi fundinum týskvøldið, men fyrireikararnir ivaðust ikki í, at hetta komst av, at enn var ætlanin so lítið ítøkilig, og at áhugin fór at veksa munandi, tá ið Suðurrás var farið at senda og fólk høvdu vant seg við tað.

Og tað verður eisini neyðugt við stórum áhuga, tí tað er ikki so lítið krevjandi at at gera útvarp, hóast teknikkurin er nógvar ferðir lættari at fáast við nú á døgum, enn hann var bara fyri nøkrum fáum árum síðani.

Tí vónar nevndin í Suðurrás eisini, at fólk bjóða seg fram at hjálpa til at gera sendingar fyri Suðurrás, tí skal alt arbeiði hanga á nevndini einsamallari, fer tað ikki at bera til í longdini.

Upptøkuhøli og -útgerð eru fingin til vega. Suðurrás heldur til í hølum uppi á Litbúðini mitt í Vági.

Næsta týskvøld verður kunnandi fundur um Suðurrás á Tvøroyri

Gávuna eg ynski allarmest, fái eg neyvan

Tá ið Atli Dam fylti 60 ár fyri tíggju árum síðani, fekk hann ta bestu føðingardagsgávuna, hann kundi ynskt sær, men nú hann fyllir 70, væntar hann ikki at fáa tað, hann kundi ynskt sær allarmest

FØÐINGARDAGUR
Áki Bertholdsen

Tey eru uttan iva mong, sum minnast, Atli Dam fylti 60 ár. Tá var hann løgmaður og í sama viðfangi fór ein politisk stórhending fram í Føroyum: Poul Schluter tók forskot upp á føðingardagin, tí dagin fyri, 11. september, 1992, kunngjørdi hann, at danska stjórnni hevði yvirgivið seg í samráðingunum um undirgrundina og gjørdi semju við føroysku heimastýrið um, at føroyingar kundu yvirtaka undirgrundina.

Tá var tað onkur, sum helt, at hetta var besta føðingardagsgáva, Atli kundi ynskt sær. Sjálvur helt hann, at hetta var størsti dagurin í hansara politiska lívi.

Og, nú vit spyrja hann aftur, 10 ár seinni, nú hann fyllir 70, heldur hann framvegis, at hetta er ein hin størsta hendingin í hansara politiska lívið – um ikki tann allarstørsta.

Síðani hevur hann sjálvandi havt góðar stundir at hugsa um hesa hendingina og hann metir framvegis at framferðin, har føroyingar løgdu dent á samráðingarleiðina, var hin rætta, tí tað var eftir bókini og tann møguleikin, sum var tann frægasti tað.

Hetta metir hann, hóast summi enn royna at sáa iva um, antin føroyingar veruliga hava fingið ræðisrættindini á undirgrundini.

Tí í hansara hugaheimi er als ongin ivi um, at tað hava vit.

Ein søgulig mynd fyri Føroyar og fyri Atla Dam. Føroya Løgmaður og danski forsætisráðharrin skriva undir avtaluna um at føroyingar hava yvirtikið undirgrundina

Fái neyvan gávuna

Men hann ásannar eisini, at tað ógvuliga avmarkaða liðið av embætisfólki, sum føroyingar tá høvdu til taks, bæði úr almennu umsitingini og úr privatu vinnuni, gjørdi eitt megnararbeiðið fyri at draga fram tilfar, sum var so sannførandi, at tað bæði snnførdi okkum sjálvi um, at hetta var gongda leiðin, samstundis sum tað gjørdi tað ógvuliga trupult hjá dønum at sýta okkum at yvirtaka undirgrundina.

– Í so máta vóru vit so væl ílatin til samráðingarnar, sum hugsast kundi og tað gav eisini úrslit.

Men síðani er nógv hent í undirgrundarmálinum. Men ikki minst er Atli Dam ógvuliga hugtikin av tí arbeiði, sum undirgrundarfyrisitingin hevur avrikað síðani og í so máta metir hann, at undirgrundin er í ógvuliga tryggum hondum, tí tey hava gjørt eitt einastandandi arbeiði.

– Men hvussu verður framvyir verður sum við so nógvum øðrum, har fara politikkur, egin áhugamál og flokspolitisk áhugamál at órógva arbeiða og tað fer altíð vera torført at umsita eitt mál sum hetta, tí áhugamálini eru so ymisk. Men sjálva fyrisitingina eiga vit at vera sera væl nøgd við.

Nú vóru tað onkur ið hildu, at hetta var besta føðingardagsgáva, Atli Dam kundi fingið á 60 ára degnum. Hvat hevði verið tað besta, tú kundi fingið á 70 ára degnum.

– Ja, tað haldi eg eisini, at tað var. Men at tosa um, hvat eg kundi ynskt mær á 70 ára degnum, nyttar ikki nógv at tosa um, tí ta gávuna, eg kundi ynskt mær allarmest, fái eg neyvan, so at seta tey ynskini fram, er ikki so átrokandi.

– Men eg ivist ikki í, at einaferð vakna fólk og seta tað rætta stýri aftur at stjórna landinum. Tann dagin verið eg glaður, tí eg meti, at tað er alneyðugt fyri land og fólk.